VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

# Ársfrásøgn

## September 2024

**FØROYA ARBEIÐSGEVARAFELAG**





# Innihaldsyvirlit


1. Tilmæli frá Føroya Arbeiðsgevarafelag 6
2. Farna árið við samráðingum 12
3. Farna árið í vinnuni og útlit 16
4. Farna árið við tiltøkum 22
5. Vaksandi áhugi fyri burðardygd 28
6. Kanningar og greiningar 32
7. Nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag 36


## *Um Føroya Arbeiðsgevarafelag*

*Føroya Arbeiðsgevarafelag er meginfelag fyri føroyskar arbeiðsgevarar á privata arbeiðsmarknaðinum og er røddin hjá privatu vinnuni á vinnupolitiskum og arbeiðsmarknaðarøkinum. Felagið eigur og rekur Vinnuhúsið, har skrivstovan hjá felagnum heldur til*



# Hendingaríkt og avbjóðandi ár



**Jón Sigurdsson**
*Nevndarformaður*

Tað eru hendingaríkar og avbjóðandi tíðir í Føroyum. Samfelagsbúskaparliga hevur tað gingið væl í Føroyum, og tað er einki at taka seg aftur í, at øll sum reka vinnu, eiga sín stóra lut í framgongdini sum hevur verið í okkara samfelag. Vinnan er motorurin, sum bjóðar av og bjóðar seg fram á so at siga øllum økjum, bæði her heima og úti í heimi. Fjølbroyttu fyritøkurnar tryggja virksemi, arbeiðspláss, lønarinntøkur og skattainntøkur til bæði land og kommunur.

Tó eru eisini avbjóðingar hjá vinnulívinum. Kostnaðarstøðið er økt gjøgnum hægri rentu, øktar lønarútreiðslur, hægri almenn gjøld og hægri innkeypsprísir. Samstundis sum samráðingarnar við arbeiðarafeløgini endaðu við einari søguliga høgari lønarhækking, eru fleiri almenn gjøld hækkaði. Harumframt ber ikki altíð til bara at hækka prísirnar, tá kostnaðarstøðið hækkar. Tí er støðan avbjóðandi hjá nógvum fyritøkum.

Hjá nøkrum fyritøkum gongst heilt væl, meðan flestu aðrar fyritøkur stríðast hvønn dag fyri at fáa eitt líkinda úrslit. Og eitt líkinda úrslit krevst, um tað skal bera til at gera íløgur og menna virksemið.

Sama um tað gongur væl ella tað gongur minni væl, so er tað eitt eyðkenni, sum gongur aftur hjá mongu fyritøkunum kring landið: Tað er viljin at fáa tingini at bera til, hoast umstøðurnar broytast til tað verra. Hesin viljin er fortreytin fyri at fáa tað at bera til, men er ikki altíð nóg mikið. Tí er tað umráðandi, at vit javnt og samt betra um umstøðurnar at reka vinnu í Føroyum.

Hjá vinnuni eru umstøðurnar støðugt umskiftiligar. Bæði nýggir møguleikar og broytingar kunnu vera avbjóðandi. Fyri at møta nøkrum av áleikandi og komandi avbjóðingunum hava vit í Føroya Arbeiðsgevarafelag valt at raðfesta nøkur øki, sum vit meta eru átrokandi:

- Betri atgongd til røttu starvsfólkini
- Størri fokus á vinnu í útbúgvingarverkinum
- Effektivisera almenna geiran
- Meira ferð á grøna orkuskiftið
- Betri marknaðaratgongd
- Størri útboð av bústøðum

Fleiri av hesum málum eru viðurskifti, sum FAG hevur havt fokus á í longri tíð, men tey eru ikki minni týdningarmikil av tí.

Vit mugu í Føroyum útbúgva fólk til tað, sum størsti tørvurin er á. Í hesum sambandi hevur Føroya Arbeiðsgevarafelag tikið stig til at kanna starvsfólkatørvin hjá føroyskum fyritøkum, so vit neyvari kunnu meta um, hvørjar útbúgvingar skulu raðfestast. Somuleiðis hava vit tikið stig til at betra um sambandið millum útbúgvingarverk og vinnu.

Eisini er tað umráðandi, at vit gera tað lokkandi at velja at búgva og virka í Føroyum, so vit minka um fráflytingina og vaksa um tilflytingina. Hetta krevur millum annað, at tað er lætt at flyta til Føroya, og at grundleggjandi tænasturnar sum bústaður, barnaansing o.s.fr, eru tøk og hava nøktandi góðsku.

Sama er galdandi, tá ið uppgávur verða fluttar millum almennar stovnar. Seinastu árini hava vit eisini brúkt nógva orku og pening til at talgilda tænastur og at

gera íløgur í infrakervið, men kortini er tað bara hjá einstøkum stovnum, at tað síggjast nakrar sparingar aftur. Kanska heldur tvørturímóti. Hetta mugu vit gera nakað við, so vit kunnu tryggja haldførið í tí almenna búskapinum, og at tað ikki verður tikið meira enn neyðugt inn í skatti og avgjøldum.

> ***Spurningurin um effektivisering og serliga leikluturin hjá tí almenna er og verður ein høvuðsavbjóðing****. Hvørja ferð, uppgávur verða fluttar til kommunurnar, standa vit í Føroya Arbeiðsgevarafelag spyrjandi, tí oftast minkar luturin hjá landinum ikki samsvarandi.*

Betri marknaðaratgongd hevur verið á breddanum í nógv ár, men tað gongur framvegis ov seint. Tó hevur gongdin víst, at um vit veruliga seta orku av til at arbeiða við marknaðaratgongdina, kann tað bera á mál. Tí eigur arbeiðið at verða skipað sum verkætlanir, har tað verður løgd ein greið ætlan fyri raðfestu marknaðirnar. Og tað krevur eisini at fólk áhaldandi eru á staðnum fyri at fremja neyðugu sambondini, hóast eingin føroysk sendistova er í landinum.

Tórshavn, tann 3. september 2024

**Jón Sigurdsson**
Formaður í Føroya Arbeiðsgevarafelag



# *Tilmæli* frá Føroya Arbeiðsgevarafelag

**Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur yvirskipað fýra mál, sum politiska skipanin eigur at arbeiða miðvíst við. Talan er um fýra ymisk mál, sum í hvør sínum lagi hava stóran týdning.**



# 1. Frá almennum vinnuvirksemi til alment kjarnuvirksemi

Tað er neyðugt at rudda upp í tí almenna vinnuvirkseminum. Bara soleiðis kann tað almenna hugsavna seg um sínar kjarnuuppgávur. Bæði land og kommunur mugu steðga við at átaka sær uppgávur, sum privata vinnan bæði kann og eigur at røkja.

Vinnuvirksemið hjá landi og kommunum eigur annaðhvørt at verða avtikið ella privatiserað. Tað eru eisini fleiri aðrar uppgávur, sum tað almenna hevur ábyrgdina av, men sum tað privata kann gera meira effektivt.

Í Føroyum eru eitt ótal av dugnaligum fyritøkum kring landið, sum eru til reiðar at røkja tær uppgávur, sum tað almenna ofta meira ella minni tilvildarliga hevur átikið sær.
Kappingin er vanliga ójøvn, tá ið tað privata skal kappast við tað almenna. Hetta kemst av, at tað almenna vanliga ikki setur krøv um avkast av almenna virkseminum ella at almenna virksemið fær aðrar sersømdir. Úrslitið er, at bæði land og kommunur brúka almennar skattakrónur til at reka ójavna vinnu. Hetta er ikki skynsamt.

### Størri gjøgnumskygni

Tað er neyðugt at fáa greiðu á, hvussu umfatandi vinnuvirksemið hjá bæði landi og kommunum er. Soleiðis tryggja vit gjøgnumskygni og eitt grundarlag fyri at taka skilagóðar avgerðir. Tí eiga land og kommunur hvør í sínum lagi at gera ein lista við uppgávum, sum tað privata kundi røkt, og taka støðu til, um tað privata ikki røkir uppgávuna betri. Hetta kann annaðhvørt verða í fríari kapping ella eftir sáttmála við tað almenna.

## Fleiri fyrimunir

Tað eru fleiri fyrimunir, um tað almenna burtur av fer at hugsavna seg um sínar kjarnuuppgávur.

Ein fyrimunur er, at váðin hjá landi og kommunum minkar munandi, tá ið tey ikki reka vinnukendar uppgávur. Um afturgongd ella kreppur gera um seg, hevur tað almenna ofta trupult við at tillaga virksemið til minkandi tørvin. Hetta er tað privata betriført at gera. Eisini fært tú eitt meira beinleiðis samband millum játtanina á fíggjarlógini og virksemið í samfelagnum, har tað er skjótari at skrúva upp og skrúva niður fyri virkseminum, alt eftir gongdini í samfelagnum.

Ein annar fyrimunur er, at minni váði er fyri at missa fokus á teimum týdningarmestu kjarnuuppgávunum, tá ið tað privata loysir ein størri part av uppgávunum. Samstundis sum eitt nú Landsverk hevur eina røð av uppgávum, ið tað privata kundi loyst betri og bíligari, undrast fleiri á, at tað gongur so illa at stýra stórum byggiverkætlanum. Hetta eigur ikki at koma óvart á nakran.

Eisini kann landið spara pening, tí tað privata vanliga hevur møguleika fyri at gagnnýta stórrakstrarfyrimunir.

## Privatisering og útveiting

Tað er neyðugt annaðhvørt at privatisera ella útveita fleiri uppgávur, sum tað almenna røkir.  Fleiri ítøkilig dømi eru um, at tað hevur verið ein stórur fyrimunur fyri borgaran at útveita almennar tænastur. Kanska besta dømið er Mykinesfarleiðin, sum tað privata rekur við einari væl betri tænastu, enn hon var, tá ið tað almenna stóð fyri henni.

### Vit kundu spurt

- Hví skal alment partafelag eiga og reka eitt hotell?
- Hví borar Landsverk tunlar og framleiðir grót, skerv og asfalt?
- Hví skulu kommunur sláa gras, rudda kava, reka kantinur og keypa grótknúsarar?
- Ella hví hevur Landssjúkrahúsið størsta vaskaríið í landinum?

Vit mugu eisini fara undir at endurskoða bæði raksturin og bygnaðin hjá tí almenna, íroknað partafeløg undir almennum eigaraskapi. Tað er til dømis ikki grundarlag fyri at reka Posta sum eitt alment partafelag longur. Uppgávurnar hjá gamla Postverki Føroya eru so nógv broyttar, at kjarnuuppgávurnar í dag eru av slíkum slagi, at tað eru fleiri privatar fyritøkur, sum reka líknandi virksemi. Tí eigur Posta at verða selt.

Yvirhøvur er tað neyðugt við einum nógv skynsamari almennum rakstri.

> *Vøksturin í almennu útreiðslunum heldur fram at vaksa. Tí er neyðugt við einum **fíggjarpolitiskum regluverki**, sum ásetur eitt mark fyri, hvussu nógv almennu útreiðslurnar kunnu vaksa.*

Ein møguleiki kundi verið millum tvey og trý prosent. Landið eigur í hesum sambandi at samráðast við kommunurnar um ein útreiðslukarm fyri til dømis eitt fýra ára tíðarskeið, ið liggur fastur, men sum kommunurnar frítt kunnu raðfesta innanfyri.

Tað er eisini neyðugt  at minka um samlaða starvsfólkatalið hjá tí almenna. Ítøkiliga kunnu vit seta okkum sum mál, at starvsfólkatalið hjá tí almenna ongantíð skal vera meira enn til dømis 40% av samlaða starvsfólkatalinum.

Vit mugu leggja nógv størri dent á at tryggja, at almennar íløgur frameftir hava við sær, at rakstrarútreiðslurnar lækka, eitt nú við at skipa almannaøkið, skúlaøkið og heilsuverkið í størri og skynsamari eindir. Eisini eigur at verða hugt eftir kommunala bygnaðinum við tí endamáli at minka um talið á kommunum, eins og politisk semja eigur at vera gjørd um talið á stjórnarráðum.

Tað er neyðugt at effektivisera tann almenna geiran á fleiri økjum. Eitt grundleggjandi og neyðugt stig er at gera eitt høvuðseftirlit, har allar uppgávurnar verða gjøgnumgingnar. Endamálið er at vísa á, um uppgávan liggur betri hjá tí privata, annaðhvørt sum ein privatisering ella at uppgávan verður útveitt. Soleiðis kann tað almenna fáa betri umstøður til at reka sítt kjarnuvirksemi, meðan privata vinnan ger tað sum hon dugir best – at reka vinnuvirksemi.



## 2. Raðfestið yrkisútbúgvingar og vinnutengdar útbúgvingar

Útbúgvingarverkið er ein heilt avgerandi liður í at tryggja, at privata vinnan bæði hevur starvsfólk við røttu førleikunum og nóg nógv starvsfólk til at loysa uppgávurnar.

Tí mugu yrkisútbúgvingar og vinnutengdar útbúgvingar raðfestast hægri. Tað er eitt nú stórur tørvur á starvsfólkum við kt-førleikum í privatu vinnuni í Føroyum.

Útbúgvingarskipanin og privata vinnan hanga ikki nóg væl saman. Tað er neyðugt at hava ein nógv sterkari samanhang millum útbúgvingarverkið og starvsfólkatørvin í privatu vinnuni frameftir.

Tað almenna má í nógv størri mun má raðfesta yrkisútbúgvingarnar og seta pening av til at umsita yrkisútbúgvingarskipanina, sum seinastu árini hevur tikið ímóti umleið 60 prosentum av einum miðal føroyskum árgangi á hvørjum ári. Tann stóra tilgongdin krevur, at orka verður sett av, so eyka trýstið ikki gongur út yvir góðskuna.

Politiska skipanin eigur ítøkiliga at virka fyri at fáa fleiri útbúgvingar og fleiri lærlingar, eins og grøna orkuskifti og burðardygd má leggjast inn í útbúgvingarnar. Men tað krevur, at eyka orka verður sett av, um tað ikki skal ganga út yvir samlaðu góðskuna í yrkisútbúgvingunum. Vit vinna lítið, um góðskan á føroysku yrkisútbúgvingunum líður undir tilgongdini og tær missa góða umdømi, tær hava havt ígjøgnum tíðirnar. Føroysk yrkislærd hava altíð verið høgt í metum úti í heimi, til stórt gagns fyri føroyska samfelagið.

## 3. Privata vinnan størri lut í grøna orkuskiftinum

Privata vinnan eigur at fáa møguleikan at lyfta ein nógv størri part í grøna orkuskiftinum. Ger hon ikki tað, røkka Føroyar ikki málinum í 2030 um, at øll orka á landi skal vera varandi orka.

Tað er bara SEV, sum kann selja og veita elorku til endabrúkaran. Monopolstøðan hjá SEV er hvørki gagnlig ella skynsom. SEV eigur tí at verða sundurskilt í eitt framleiðslufelag og eitt netfelag, soleiðis at størri kapping verður um el-framleiðsluna. Endamálið við at sundurskilja partar av virðisketuni hjá SEV er at tryggja gjøgnumskygni og skipa elmarknaðin soleiðis, at vit fáa lægst møguligar prísir til brúkaran, herundir eisini vinnuliga brúkaran.

Tað er ein stórur trupulleiki hjá privatu vinnuni, at tað gongur so seint við grøna orkuskiftinum. Í 2023 var bert helvtin av elorkuni frá varandi orkukeldum.

### Kappast við útlendskar fyritøkur

Føroyskar fyritøkur kappast við umheimin og at tað ikki ber til at lækka sítt útlát meir enn eitt vist, ger, at tað verður torførari at kappast við útlendskar fyritøkur, ið hava nærum óavmarkaða atgongd til grøna orku.

Tað er tí alt avgerandi, at politiska skipanin tryggjar, at verulig ferð kemur á at framleiða varandi orku. Skal tað verða lokkandi at reka vinnuligt virksemi í Føroyum, er eitt undirstøðukervi við nóg mikið av grønari og bíligari orku ein fyritreyt.

Føroyskar vinnufyritøkur eru størstu kundarnir hjá føroyskum orkuveitarum. Skipaflotin brúkar næstan helvtina av samlaðu oljunýtsluni í Føroyum, meðan vinnufyritøkur á landi brúka meira enn helvtina av samlaðu el-nýtsluni í Føroyum. Serliga fyri skip og fyri ávísar framleiðslufyritøkur eru orkuútreiðslurnar ein týðandi partur av samlaðu útreiðslunum. Tað hevur tí týdning fyri kappingarførið hjá føroyskum vinnufyritøkum, at orkuframleiðslan er effektiv og at orkukostnaðurin er lágur.








## 4. Tað privata seta ferð á bústaðabygging

Tað hevur í nógv ár verið ein ódekkaður tørvur á bústøðum í Føroyum. Fyrsta stig at nøkta tørvin er at kommunurnar mugu útstykkja fleiri øki til bústaðarendamál.

Annað stig er at tryggja, at eisini privata vinnan hevur møguleika at verða við til at loysa bústaðartørvin. Hetta er alneyðugt, um vit vilja hava nakað at henda skjótt

Politiska skipanin eigur tí sum skjótast at javnseta møguleikarnar hjá tí almenna og tí privata at byggja bústaðir. Um kappingin er ójøvn, gerst tað minni lokkandi hjá privatu feløgum at gera íløgur og kappast. Eitt stig er at bøta um karmarnar fyri smærri íbúðarverkætlanum í lóggávu og avskrivingarmøguleikum.

Til dømis fær Bústaðir ókeypis grundøki frá kommununum og sleppur undan at renta allan byggikostnaðin. Nýggju møguleikarnir hjá kommunum at stovna bústaðafeløg við 10 til 20 prosentum av pengunum hjá skattaborgarunum sum innskot er enn eitt kappingaravlagandi stig frá politiska myndugleikanum. Um politiska skipanin vil tryggja, at húsleigan ikki gerst ov høg, er ein betri loysn at gera eina skipan við býlisstuðli, bæði til tey sum leiga frá tí almenna og frá tí privata.

Í stuttum eigur politiska skipanin:

- At útstykkja fleiri grundstykkir til bústaðarendamál
- At avtaka heimildina hjá kommunum at seta á stovn bústaðarfeløg saman við Bústøðum
- At javnseta kappingina millum almenna og privata bygging
- At seta eina skipan við býlisstuðli í verk





# Farna árið við *samráðingum*

**Ein høvuðsuppgáva hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag er at samráðast við fakfeløgini um kollektivar sáttmálar á privata arbeiðsmarknaðinum.**



## Samráðingarumfarið 2024-2026

Síðani seinastu ársfrágreiðing hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag er semja gjørd um sáttmálar við Føroysk Miðlafólk við sama karmi, sum var lagdur fyri samráðingarumfarið 2022-2024.

Størsta sáttmálaøkið eru sáttmálarnir við tey fimm arbeiðarafeløgini, Føroya Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðskvinnufelag, Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag og Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag. Samráðingarnar við hesi feløg eru tær fyrstu í hvørjum nýggjum samráðingarumfari. Hesar samráðingarnar leggja støðið undir øllum sáttmálunum í umfarinum.

Samráðingarnar við tey fimm arbeiðarafeløgini byrjaðu í mars 2024. Samráðingarnar endaðu við seming. Semingsstovnurin legði semingsuppskot fyri partarnar, sum bæði Føroya Arbeiðsgevarafelag og tey fimm feløgini havnaðu. Arbeiðarafeløgini lýstu síðani verkfall tann 13. mai.

Ósemjan millum partarnir snúði seg um samlaðu lønarhækkingina, har arbeiðarafeløgini vildu hava eina óvanliga høga lønarhækking, sum skuldi bøta fyri prísvøksturin í samfelagnum. Harafturat órógvaði lønarlyftið, sum tað almenna hevur givið ávísum láglønarbólkum, samráðingarnar.

> *Føroya Arbeiðsgevarafelag var sinnað at geva eina **søguliga høga lønarhækking**, men neyðugt var at taka atlit til, at ein ov høg lønarhækking kundi seta ávísar vinnugreinir og fyritøkur undir eitt ov stórt trýst.*

Tann 9. juni 2024 tóku bæði arbeiðsgevara- og fakfelagssíðan undir við einum semingsuppskoti, og verkfallið var av.

Semingsuppskotið gav eina lønarhækking á 3,25% fyrra árið, og 3,23% seinna árið. Eftirlønargjaldið skuldi frameftir roknast av allari A-inntøku, og eftirlønin hækkaði úr 11,2% til 12% tann 1. mai 2025. Harumframt vóru eisini aðrar broytingar. Tilsamans er karmurin fyrsta árið 4,32% og næsta árið 3,87%.

Umframt karmin varð ein avtala gjørd við arbeiðarafeløgini um eina serstaka viðbót á 3,75 kr. tann 1. mai 2024 og 3,50 kr. tann 1. mai 2025. Henda serstaka viðbótin líkist tí lønarlyfti, sum landsstýrið hevur latið ávísum láglønarbólkum.

## Samráðingar og at stytta arbeiðstíðina

Undir samráðingunum við arbeiðarafeløgini tók Føroya Arbeiðsgevarafelag upp málið um at stytta arbeiðstíðina. Arbeiðarafeløgini fingu bjóðað at stytta arbeiðstíðina eftir sama leisti, sum landsstýrið arbeiðir við í løtuni. Arbeiðarafeløgini vildu tó ikki viðgera arbeiðstíðina nærri. Tey vildu heldur ikki gera eina avtalu um at viðgera arbeiðstíðina í sáttmálatíðarskeiðnum.

## Komandi sáttmálasamráðingar

Sáttmálarnir, ið eru eftir at samráðast um í hesum samráðingarumfari, kunnu síggjast niðanfyri.





3.

# Farna árið *í vinnuni og útlit*

**Tað gongur sum heild væl í vinnuni og komandi árini eru útlitini hjá vinnuni hampiliga góð. Eitt hækkandi kostnaðarstøðið, eitt nú við hægri avgjøldum, hægri rentum, hægri lønum og hægri tilfarsprísum ávirkar tó eisini vinnuna.**



## Laksur

Í fjør lækkaði útflutningsvirðið av laksi eitt vet, frá 5,5 milliardum krónur í 2022 til 5,3 milliardir kr. í 2023. Høvuðsorsøkin var, at samlaða tøkan lækkaði úr 89.000 tonsum niður 80.000 tons.

Tøkan er mett at gerast størri í 2024, enn hon var í 2023.

Føroyska alivinnan hevur ætlanir um at økja um framleiðsluna komandi árini, og hetta kann merkja størri útflutningsnøgdir, um lívfrøðiliga gongdin annars er jalig. Metingin er, at laksaprísurin á heimsmarknaðinum fer framhaldandi at vera góður, tí vøksturin í útboðnum væntandi verður avmarkaður.

## Uppsjóvarfiskur

Í 2023 var útflutningsvirðið slakar 1,8 milliardir krónur. Hetta var eitt vet minni enn í 2022. Hetta komst fyrst og fremst av, at útflutningsvirði á makreli og svartkjafti lækkaði.

Árið 2023 var serstakt, tí lýsi- og fiskamjølprísir vóru met høgir. Tað førdi við sær, at nógvur makrelur, sum vanliga verður landaður hjá uppsjóvarvirkjunum, heldur bleiv landaður sum ídnaðarfiskur til Havsbrún ella uttanlands. Tað vil siga, at útflutningurin av ídnaðarfiski, fiskamjøli og lýsi vaks, meðan makrelútflutningurin til matna fall eitt vet.

Føroyar, Bretland og Noreg hava undirskrivað semju um at skipa fiskiskapin eftir makreli í 2024. Í semjuni fingu Føroyar eina kvotu upp á 98.708 tons áðrenn býti við onnur lond. Eftir býti við onnur lond verður kvotan til føroysk skip sløk 69.000 tons. Samstundis sleppa Føroyar at fiska 35 prosent av sínari kvotu í bretskum sjógvi og 40 prosent í norskum sjógvi.

Svartkjaftakvotan er metstór í 2024, 543.000 tons. Vinnan væntar, at makrelurin í 2024 í størri mun aftur verður landaður hjá uppsjóvarvirkjunum, og verður sostatt aftur útfluttur sum makrelur til matna. Harvið kann útflutningurin av fiskamjøli og lýsi í 2024 minka í mun til 2023. Stóra svartkjaftakvotan ger hinvegin, at útflutningurin av fiskamjøli væntandi verður størri í 2024 enn í 2022. Tá ið svartkjaftakvotan er so mikið stór, og svartkjaftanøgdin til matna ikki veksur, verður helst ein partur av svartkjaftinum landaður uttanlands í 2024.

**Útflutningsvirðið.** *Laksur*




*Kelda: Hagstova Føroya*

**Útflutningsvirðið.** *Makrelur, sild og svartkjaftur*




*Kelda: Hagstova Føroya*




## Botnfiskur

Í 2023 var samlaða útflutningsvirði 1,4 milliard krónur sammett við 1,7 milliard krónur í 2022.

Ein orsøk var, at veiddu nøgdirnar vóru minni. Toskur, hýsa og upsi høvdu eina lækking frá góðum 38 túsund tonsum í 2022 til sløk 34 túsund tons í 2023.

Sambært tilmælinum frá Havstovuni fyri 2024 hevur støðan í toskastovninum ongantíð áður verið so vánalig. Neyðugt er tí við átøkum fyri at verja og endurreisa stovnin. Av somu orsøk hevur landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum tikið stig til skerja fiskidagarnir hjá bólki 3-5 við 20 prosentum og fiskidagarnir hjá bólki 2 við 10 prosentum.

Føroyar hava, umframt livandi tilfeingið í føroyskum sjógvi, rættindi at veiða uttan fyri føroyskan sjógv. Sínámillum fiskiveiðisáttmálar eru fyri 2024 gjørdir við Ísland, Grønland, Noreg og Russland. Avtalurnar fevna um, at Føroyar fáa rættindi at veiða kvotur í havøkjunum hjá hesum londum í býti við kvotur í føroyskum sjógvi. Harumframt kunnu Føroyar veiða botnfisk á Flemish Cap og við Svalbard við støði í søguligum rættindum.

Samlaða kvotan í Barentshavinum hevur verið lækkandi seinastu árini og er minni í 2024 enn undanfarin ár. Hetta fær vinnuna at vænta ein hægri prís á toskinum í Barentshavinum í ár.

## Shipping

Ein av størstu avbjóðingunum í shipping vinnuni er framvegis at finna skikkaða manning til skipini. Talið av føroyingum umborð á handilsskipum stendur í stað, meðan talið av útlendskum sjófólki er í vøkstri. Hetta vísir, at tað er trupult at finna føroyingar til skipini, og tí er alneyðugt við tryggum og góðum skipanum fyri útlendsk sjófólk.

Handilsflotin er farin undir at umleggja til grønar orkukeldur, og harvið minka um útlátið í flotanum. Vinnan virkar undir strongum altjóða krøvum, sum bæði eru umfatandi og rúgvismikil, og tey fara komandi árini at krevja stórar umleggingar hjá reiðaríunum. Tað kemst ikki uttanum, at hetta fer at ávirka vinnuna.



## Minni bjartskygni í byggivinnuni

Stórur vøkstur hevur verið í løntakaratalinum og lønargjaldingunum í byggivinnuni frá 2013 til 2020, tá ið lønargjaldingarnar og løntakaratalið vóru í hæddini. Síðani 2020 hevur eitt lítið fall verið í bæði løntakaratali og lønargjaldingunum í byggivinnuni.

Nýggjasta konjukturfrágreiðingin hjá Hagstovu Føroya vísir, at byggivinnan hevur ikki eins góðar vónir um framtíðina, sum hon hevur havt.  Byggifyritøkurnar siga, at bíleggingarnar eru færri, men tryggjað arbeiði í tal av mánaðum stendur í stað. Byggifyritøkurnar vænta, at prísurin á teirra arbeiði fer at hækka komandi árið.

Ein avmarking fyri framleiðsluna í byggivinnuni er tó framvegis tørvurin á skikkaðari arbeiðsmegi.

## Glottar í handilsvinnuni

Nýtsluatferðin hjá føroysku brúkarunum hevur týdning fyri handilsvinnuna, tí brúkarin keypir stóran part av teimum vørum, sum hendan vinnan bjóðar út á føroyska marknaðinum.  Nýggjasta konjukturfrágreiðingin hjá Hagstovu Føroya vísir, at føroysku húsarhaldini ella brúkararnir er nakað bjartskygdari nú, enn tey hava verið seinastu tvey árini.

Hvussu privata nýtslan kemur at hátta sær komandi tíðina, er ilt at siga, men møguliga er ein lítil glotti at hóma hjá handilsvinnuni. Prísirnir hækka ikki eins skjótt, sum teir hava gjørt seinastu trý árini.

> *Handilsvinnan væntar, at* ***sølan komandi árið fer at hækka.***

Eitt lyklatal, ið kann geva ábendingar um privatu nýtsluna, er søla av persónbilasølan. Tá ið fólk gerast meira varin, gongur tað serliga útyvir drúgvar vørur, og serliga størru íløgurnar, so sum bilar. Sølan av nýggjum persónbilum til privata nýtslu er lækkað nógv síðani 2020 og serliga var afturgongdin stór í 2022 (37%). Tilsamans lækkaði sølan av nýggjum og brúktum persónbilum til privata nýtslu 17% frá 2021 til 2022 og aftur 7% frá 2022 til 2023.

## Ráðgeving, tænastur og annar ídnaður

Føroyskir byggiharrar eru fúsir at brúka føroyskar ráðgevar, og hetta hevur lyft ráðgevaravinnuna í Føroyum fram á leið. Ein kanning hjá Ráðgevarafelagnum vísir, at  nógv tann størsti kundabólkurin hjá ráðgevaravinnuni í 2022 var tað privata. Kanningin vísti, at 43% av kundunum vóru frá privatu vinnuni, 26% frá kommunala geiranum og 16% frá tí almenna. 15% vóru skrásett sum "annað".

Føroyska KT-vinnan hevur verið í stórum vøkstri seinastu árini. Føroyar stevna inn í eina talgilda framtíð, har tøknin verður ein alt meira sjónligur partur av gerandisdegnum. Eftirspurningurin eftir KT tænastum er tí nógv øktur og fer at økjast enn meira frameftir. Fortreytirnar fyri at føroyska samfelagið skal fáa ágóðan av talgildingini er, at uppgávurnar verða bodnar út millum føroyskar fyritøkur, soleiðis at førleikarnir at viðlíkahalda og menna talgilda infrakervið eisini eru í Føroyum í framtíðini.

Føroyska samskiftisvinnan hevur merkt støðugt og vaksandi virksemi og framgongd hesi seinastu árini, bæði her heima og uttanlands.

Annars er føroyskur ídnaður eyðkendur við einari ella fáum fyritøkum av sama slagi, t.d. matvøruframleiðarum, bryggjaríum, prentsmiðjum og framleiðarum av reingerðarevnum. Felags fyri framleiðsluna hjá føroyskum ídnaðarfyritøkum er, at tær virka í stórari og mangan ójavnari kapping við útlendskar framleiðarar, tí hesir hava í fleiri førum fría atgongd til føroyska marknaðinum, samstundis sum somu føroysk framleiddu vørurnar kunnu verða álagdar ymisk avgjøld.






## Fleiri ferðafólk og stórur umsetningur

Samlaði umsetningurin frá útlendskum ferðafólkum var 945 milliónir krónur í 2023 samanborið við 900 milliónir krónur í 2022.  Ein høvuðsorsøk til vøksturin stavar frá øktu inflatiónini, har eitt nú hægri oljuprísir hava gjørt, at ferðaseðlaprísirnir eru hækkaðir. Harumframt eru renturnar eisini hækkaðar. Umsetningsvøksturin sæst tí ikki so væl á botnlinjuni hjá fyritøkunum.

Samlaða talið av ferðafólkum í 2023 var um 130.000 sammett við 100.000 í 2022. Ein stórur partur av vøkstrinum stavaði frá cruise-skipum, sum at kalla vóru burtur í 2021 og 2022.

221.575 gistingar vóru á gistingarhúsum – tað er 4 prosent lægri enn 2022. Sostatt sæst økta talið á ferðafólki ikki aftur á gistingarhúsunum. Góður helmingur av kømurunum á føroysku gistingarhúsunum vórðu brúkt í fjør.

### Lyklatøl 2023

**Umsetningur av ferðavinnuni**
**945**
mió. kr.
*samanborið við 900 mió. í 2022*

**Tann innkomandi ferðavinnan skapti**
**578**
ársverk
*samanborið við 615 í 2022*

**Útlendsk ferðafólk**
**130**
túsund
*samanborið við 100.000 í 2022*

**Samleiða føroyska útflutningsvirðið**
**6%**
*samanborið við 5,8% í 2022*

**Gistingar á gistingarhúsum**
**221.575**
*-4 samanborið við 2022*

---

## Samanumtikið: Hampilig útlit

Útlitini hjá føroysku vinnuni eru hampiliga góð komandi árini. Spenta støðan úti í heimi og óvissan um týðandi fiskastovnar hevur ein ótryggleika við sær, men tað stimbrar undir hugin hjá vinnuni og privatpersónum at gera íløgur, nú stóri rentuvøksturin tykist hæsaður av og ávíst tamarhald sýnist at vera á inflasjónini. Hetta birtir undir hugin hjá vinnuni og privatpersónum at gera íløgur. Hinvegin er kostnaðarstøðið í Føroyum økt, bæði við hægri almennum gjøldum og við hægri lønarhækkingum enn hjá kappingarneytunum.



# Farna árið *við tiltøkum*

**Hvørt ár skipar Føroya Arbeiðsgevarafelag fyri nógvum og fjølbroyttum tiltøkum.**




# Vinnudagurin 2023

Vinnuhúsið hevur síðani ár 2000 skipað fyri árliga Vinnudegnum. Í fjør var Vinnudagurin, fríggjadagin tann 29. september í Norðurlandahúsinum.  Umframt fleiri áhugaverdar fyrilestrar, so vórðu Ársins Virki og Vinnuátakið kosin.



## Navigare Shipping
## Ársins Virki 2023

Dómsnevndin grundgav millum annað soleiðis fyri at velja Navigare Shipping til Ársins Virki 2023:

*"Ársins virki 2023 er ein av størstu flutnings-fyritøkunum í Føroyum, og virkar serliga innan vinnuflutning. Fyritøkan flytur um tvey mió. tons av vørum árliga, og liggur áleið 80% av søluni hjá felagnum í dag uttan fyri Føroyar.*

*Við støði í tí stóra framfýsni og skipaðu menningini av felagnum, saman við góðu fíggjarligu úrslitunum og tí denti sum verður lagdur á serliga umhvørvisliga burðardygd og grønu leiðina í felagnum, hevur dómsnevndin valt Navigare Shipping sum Ársins Virki 2023."*



## Battery Briner ársins
## Vinnuátak 2023

Dómsnevndin grundgav millum soleiðis fyri at velja Battery Briner hjá Tummasi Justinussen.  til Vinnuátakið 2023:

*"Eld-sløkkiskipanin hjá Battery Briner kann nøkta ein stóran og vaksandi tørv, sum serliga er eyðsýndur umborð á stórum skipum, men sanniliga eisini aðrastaðni. Brandsløkkiskipanin kann vónandi í framtíðini økja um trygdina hjá mongum fólkum, ikki einans í Føroyum, men eisini úti í heimi. Við hesari framfýsnu og nýhugsandi tilgongdini, hevur toymið handan Vinnuátakinum skapt ein vinnumøguleika, sum eisini vísur sosiala og umhvørvisliga burðardygd."*




*Carl-Johan Dalgaard, formaður í danska Búskaparráðnum.*



*Rani Slættanes frá Vestmek greiðir frá teirra virksemi.*

## Neyðugt at styrkja haldførið

Í februar 2024 skipaði Føroya Arbeiðsgevarafelag fyri einum almennum tiltaki við ymiskum framløgum um vantandi haldførið í føroyska búskapinum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur, at tað er neyðugt við fíggjarpolitiskum afturhaldi, einum regluverki, sum ásetur eitt mark fyri, hvussu nógv almennu útreiðslurnar kunnu vaksa. Eisini er skilagott at hækka pensjónsaldurin.

## Ráðgevarafelagið 15 ár

Tað eru 15 ár síðani, at Ráðgevarafelagið varð sett á stovn. Í tí sambandi skipaði felagið fyri einum tiltaki við fjølbroyttum og spennandi framløgum í Silo í Havn. Felagið eigur sítt pláss í føroyska samfelagnum, og verður javnan spurt um sína hugsan um ymisk áleikandi mál. Føroyska ráðgevaravinnan hevur tað gott, har tað eru fleiri enn 180 størv. Hetta er helst eindømi í smátjóðum, sum Føroyar kunnu samanbera seg við.

## Tiltak um sosialar miðlar í setanarviðurskiftum

Føroya Arbeiðsgevarafelag skipaði í vetur fyri kunningarfundum um, hvussu arbeiðsgevarar eiga at fyrihalda seg til starvsfólk og hvussu tey brúka sosialar miðlar.

Tað, sum starvsfólk gera á sosialu miðlunum, kann hava stórar avleiðingar fyri arbeiðsgevaran.

Og júst tí eiga arbeiðspláss at hava reglur og mannagongdir fyri, hvussu starvsfólk bera seg at á til dømis Facebook og Instagram.

Á tiltakinum varð greitt frá ymiskum mannagongdum, sum arbeiðsgevarar kunnu hava í sambandi við at seta treytir fyri, hvussu og nær starvsfólk brúka telefon og sosialar miðlar.

## Vinnuvitjan í vesturøkinum

Føroya Arbeiðsgevarafelag roynir stútt og støðugt at koma tættari at sínum limum í teirra gerandisdegi.

Felagið hevur limir kring alt landið, og tí verður javnan skipað fyri tiltøkum og vitjanum kring landið.

Vinnuhúsið vitjaði í november 2023 fleiri fyritøkur í vesturøkinum, í Vágum og í Vestmanna. Talan var um gevandi vitjanir, har nakrar av fyritøkunum millum annað vístu á avbjóðingarnar at finna starvsfólk.

### Vinnuhúsið vitjaði fyritøkurnar:

Thorfinn Nielsen, Grant, Klima, Sandavágs Timburhandil, Vestmek, Vestpack, Vestmanna Tourist Center og Hiddenfjord




*Umboð fyri Vinnuhúsið og Sansir við føroyska landabásin.*

## Seafood Expo Global í Barcelona

Seafood Expo Global, ið er heimsins størsta fiskavøru-messa varð í 2024 hildin í døgunum 23.-25. apríl í Barcelona. Tær flestu føroysku útflutningsfyritøkurnar vóru á stóra føroyska landabásinum, sum nógvir keyparar úr øllum londum vitjaðu.

Føroyski landabásurin var í ár víðkaður úr 364 fermetrum upp í 428 fermetrar, sum er tað størsta hann nakrantíð hevur verið, so leingi Føroya Arbeiðs-gevarafelag hevur samskipað básin.

### Við á føroyska básinum vóru:

Bakkafrost, Enniberg, Hiddenfjord, JFK, Kósin, Landshandilin, Maresco, North Pelagic, Pelagos, PRG, Rainbow Seafood, Vaðhorn og Varðin Pelagic.

## Metnógv fólk á Aliráðstevnuni 2024

Ongantíð áður hava so nógv fólk verið á Aliráð-stevnunum, sum varð fyriskipað í vár. Luttakaratalið táttaði í 450 fólkum. Tey flestu komu úr alivinnuni, granskingarstovnum, undirveitarum til alivinnuna og frá almennum myndugleikum

Á skránni vóru framløgur um gongdina í føroysku ali-vinnuni. Eisini viðgjørdu fyrilestrarhaldararnir ymiskar áleikandi avbjóðingar og møguleikar í alivinnuni.

Tað er Havbúnaðarfelagið, sum skipar fyri Aliráðstevnuni.

## Stórur áhugi fyri Rosebank feltinum

Í januar 2024 skipaði Sjóvinnufelagið fyri kunnandi tiltaki í sambandi við, at Rosebank feltið skal byggjast út eystanfyri føroyska markið. Tiltakið var gjørt í góðum samstarvi við Føroya Orkuídnaðar-bólkur.

Á tiltakinum greiddu leiðandi fólk frá orkufelagnum Equinor um stóru útbyggingini av Rosebank olju- og gasskelduni. Fólk frá umleið 50 ymiskum fyritøkum luttóku, umframt fleiri politikarar og onnur við tilknýti til vinnuna í Føroyum.

## Felag fyri bilasølur stovnað

Bilasølufelagið er nýggjasta vinnugreinafelagið, sum er partur av felagsskapinum í Vinnuhúsinum. Felagið varð stovnað í februar 2024. Á stovnandi aðalfundinum vórðu 7 fólk vald í nevndina.



## Kunning um handilsmøguleikar millum Føroyar og USA

Í juni 2023 skipaði Vinnuhúsið saman við ameri-kansku sendistovuni í Keypmannhavn fyri kunnandi tiltaki um handilsmøguleikar millum Føroyar og USA. Nógvar fyritøkur møttu á tiltakinum.

Samhandilin millum Føroyar og USA er øktur munandi seinastu árini. Í fjør útfluttu Føroyar fyri meira enn eina milliard krónur til USA, sum er 700 milliónir krónur meira enn fyri 10 árum síðan.



*Samson Højgaard, ársins eldsál 2023, Regin W. Dalsgaard, ársins nýbrot 2023, og Karin Visth, ársins ferðavinnufólk 2023.*

# Ferðavinnustevnan 2023

Í november 2023 skipaði Ferðavinnufelagið fyri árligu ferðavinnustevnuni. Umframt fleiri áhugaverdar fyrilestrar, vórðu Ársins Ferðavinnufólk, ársins Eldsál og Ársins Nýbrot kosin.

## Samson Højgaard

**Ársins Eldsál 2023**

Dómsnevndin grundgav soleiðis fyri at velja Samson Højgaard Ársins Eldsál 2023:

*"Ein sannur mentanarberi. Eldhugaður og við ágrýtni strembar hann eftir at varðveita og greiða frá føroysku mentanini. Hann leggur alt í at endurskapa eftir gomlum siði. Á ektaðan hátt, avhendar hann ferðafólki eina uppliving av staðbundna siðaarvinum framvið sjóvarmálanum. Við siðbundna træbáti sínum bjóðar hann á ein blídligan og ektaðan hátt við á fiskitúr. Við dugnasemi mennir hann havferðafinnuna, og tætt at sjófuglalívi og sjólívi gongur hann við burðardygd hond í hond."*

## Við Peter Pan til Neverland

**Ársins Nýbrot 2023**

Dómsnevndin grundgav soleiðis fyri at velja “Við Peter Pan til Neverland” til ársins nýbrot 2023:

*"Við dirvi og nýhugsandi hugburði hava tey megnað at menna eitt tilboð, sum samansetur læring, menning og spæl. Ein ævintýrakend uppliving, sum bjóðar bæði børnum og vaksnum inn. Tey hava megnað at knýta ævintýrið til eina ógloymandi uppliving, sum sameinar ævintýr við vitan um sluppir og føroysku náttúruna. Ein livandi leikpallur í einum kendum ævintýri, sum børn og vaksin kunnu uppliva í egnum landi."*

## Karin Visth

**Ársins Ferðavinnufólk 2023**

Dómsnevndin grundgav soleiðis fyri at velja Karin Visth Ársins Ferðavinnufólk 2023:

*"Hon brennir fyri sínum øki. Hon dugir at síggja tørvin, og við dugnasemi mennir hon eina serstaka matvinnu í Føroyum. Hon heldur fram at finna upp á og setur Føroyar á heimskortið. Sum ein sannur liðleiðari, við kundanum í miðdeplinum, leiður hon sínum vitjandi gjøgnum eina dámliga uppliving. Við føroysku mentanini sum kjarnu, dugir hon á nýbrótandi hátt at samantvinna mentanir í tænastuni, sum dregur forvitnisligar føroyingar og ferðafólk at dámligu upplivingini."*





# 5.

# Vaksandi áhugi *fyri burðardygd*

**Í 2023 fór Vinnuhúsið undir at ráðgeva innan burðardygd. Við nýggju ráðgevingini skal Vinnuhúsið stuðla limunum í at seta sær mál og at skjalprógva burðardygdina í teirra virksemi.**



## Vaksandi áhugi

Tað er ein vaksandi áhugi hjá føroyskum fyritøkum at gerast meiri burðardyggar.

Eftirspurningur og krøv frá ymiskum áhugabólkum hevur við sær, at flestu fyritøkur verða noyddar taka støðu til burðardygd. Samstarvsfelagar, kundar, íleggjarar og myndugleikar kunnu seta krøv til, at fyritøkan kann skjalprógva, hvussu burðardygg hon er. Og hetta kann bæði ávirka áhugan at keypa vørur ella tænastur frá fyritøkum, men eisini fíggingartreytir og áhugan hjá starvsfólki at starvast hjá fyritøkuni.

## Burðardygd í einum vinnuligum høpi

Burðardygd fevnir um fleiri viðurskifti og eitt altjóða felags heiti fyri hesi er "ESG", ið stendur fyri environmental, social and governance. Á føroyskum verða hesi viðurskifti nevnd umhvørvi, sosial og leiðsla. Viðurskifti innan umhvørvið eru til dømis dálking og útlát. Sosial viðurskifti eru eitt nú ávirkan á lokalsamfelag, og arbeiðsumstøður og leiðsla snýr seg m.a. um førleikar hjá nevnd og gjøgnumskygni í fyritøkuni.

Til at samanbera fyritøkur og at máta burðardygd verða ESG-lyklatøl brúkt.



## Arbeiðsfundir

Á heysti í 2023 skipaði Vinnuhúsið fyri eini røð við seks arbeiðsfundum, har 29 føroyskar fyritøkur luttóku. Endamálið við fundarrøðini hevur verið at geva fyritøkum amboð og førleikar at máta burðar-dygd og at seta sær mál á burðardyggu kósini.

Eftir arbeiðsfundirnir meldaðu 22 fyritøkur út, at tær ætla at gera eina almenna frágreiðing/lyklatøl fyri 2023, meðan hinar sjey fyritøkurnar miðja fram ímóti at gera hetta frá 2024.

Ætlanin at hava eitt líknandi skeið aftur á heysti 2024.

## Burturkast má fáa hægri politiska raðfesting

Føroyskar fyritøkur eiga meira enn helmingin av samlaða føroyska burturkastinum. Tí liggur ein stór ábyrgd á vinnuni at tryggja meiri endurnýtslu og endurvinning. Tað verður bert ein fjórðingur av burturkastinum í Føroyum endurvunnin og skal meir tilfar verða hildið í ringrás er neyðugt, at politiska skipanin raðfestir burturkastøkið væl hægri.

Vinnufyritøkur hava fleiri ferðir víst á, at tað er ein afturvendandi avbjóðing at fáa til vega hagtøl og betri kunning um burturkastmongdir. Verandi skipan er ikki nóg góð, tí hon krevur umrokningarfaktorar ella manglar skrásetingar.





# Kanningar og greiningar

**Seinasta árið hevur Føroya Arbeiðsgevarafelag gjørt fleiri kanningar og greiningar, sum hava týdning fyri bæði føroysku vinnuna og samfelagið. Eisini hevur Føroya Arbeiðsgevarafelag staðið á odda fyri ymiskum verkætlanum.**



## Stórur starvsfólkatørvur

Privata vinnan hevur stóran tørv á fleiri starvsfólkum frameftir. Um nøkur ár verður tørvurin millum 700 og 850 fleiri starvfólkum. Tað er ein av niðurstøðunum í starvsfólkakanningini, sum Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur gjørt.

> *Tað er gravgangur eftir at seta* ***yrkislærd*** *starvsfólk í starv.*

Fyritøkurnar leita millum annað eftir smiðjum, mekanikarum, sølufólkum, timburmonnum, kokkum, tænarum, elektrikarum, sveisarum, alarum og bakarum.

Tað er eisini stórur tørvur á starvsfólkum við kt-førleikum í privatu vinnuni í Føroyum, men tey eru trupul at finna.

Útbúgvingarskipanin er ein avgerandi liður í at veita privatu vinnuni nóg mikið av starvsfólkum í framtíðini. Útbúgvingarskipanin skal eisini vera við til at tryggja, at privata vinnan fær fatur á starvsfólkum við røttu førleikunum.

## Betri marknaðaratgongd

Ein kanning, ið byggir á tørvin hjá 21 útflutnings-fyritøkum, staðfestir, at føroyskar fyritøkur vilja hava fleiri og betri møguleikar at útflyta sínar vørur og tænastur.

Á ávísum marknaðum hava vit kappingarførar treytir, men fyritøkurnar vísa á, at tær á nógvum marknaðum hava verri - í ávísum førum nógv verri - treytir at útflyta teirra vørur og tænastur enn teirra nærmastu kappingarneytar.

Innan vøruútflutning ger hetta seg serliga galdandi fyri alilaks og uppsjóvarfisk á ymiskum marknaðum. Av somu orsøk vilja føroyskar fyritøkur fáa betri atgongd til stóru asiatisku marknaðirnir, serliga Kina, Suðurkorea, Japan og India.

Føroyskar útflutningsfyritøkur, serliga innan salt-fiskavinnuna, vilja eisini sleppa at útflyta fisk til Brasil, sum er fólkaríkasta landið í Suðuramerika.

### Raðfestið asiatiska marknaðin

- Japan
- Suðurkorea
- Kina
- India





## Fleiri tvískattasáttmálar

Fyri føroyskar tænastuútflytarar er tað ein stór avbjóðing, at Føroyar hava so fáar tvískattasáttmálar við onnur lond. Tað eru serliga fyritøkur í sjóvinnuni sum gera vart við henda trupulleika í spurnakanningini.

Tær vísa á, at føroysk reiðarí javnan síggja handilsligar møguleikar uttanlands, har tey sum útgangsstøði eru kappingarfør, men tvørligu skattaviðurskiftini landanna millum ger, at tey missa hetta kappingarførið. Hetta er ein óneyðug avbjóðing, ið minkar um marknaðin, sum skipini kunnu virka á. Tað ger tað eisini truplari at vaksa um føroyska flotan.

Vinnuhúsið og landsstýrið eru farin undir eitt arbeiði í felag, sum hevur til endamáls at greina nærri, hvørji stig eru neyðug at taka fyri at fáa fleiri tvískattasáttmálar í lag.

## Útlendsku starvsfólkini stóran týdning

Ein greining frá uttanhýsis búskaparfrøðingi vísir, at útlendsku starvsfólkini í Føroyum hava stóran týdning fyri privatu vinnuna og føroyska búskapin.

Greiningin staðfestir, at búskaparligi framburðinum seinastu 10 árini hevði ikki latið seg gera uttan útlendsku starvsfólkini. Ein meting við fyrivarnum, ið byggir á samanberingar við Danmark, vísir, at tey 2000 útlendsku starvsfólkini í Føroyum góvu eitt íkast til BTÚ sum svarar til 1,75 milliard krónur í 2023.

Í Føroyum er talið av løntakarum við útlendskum ríkisborgaraskapi økt frá áleið 2,5 prosentum til umleið 7 prosent í 2024. Til samanberingar eru 23 prosent av løntakarunum í Íslandi útlendingar, meðan tað í Danmark eru 13 prosent.

## Nýtt sambindingarlið millum arbeiðsgevarar og Almannaverkið

Seinasta árið hevur Vinnuhúsið staðið á odda fyri einari verkætlan, sum hevur til endamáls at styrkja samstarvið og samskiftið millum arbeiðsgevarar og Almannaverkið fyri at breiðka gøtuna hjá fólki við serligum arbeiðsføri inn á arbeiðsmarknaðin.

Arbeitt verður at seta eitt sokallað arbeiðsgevaranetverk á stovn, sum skal virka sum sambindingarlið millum arbeiðsgevarar og Almannaverkið. Hetta er eitt ítøkiligt úrslit av arbeiðinum við at eftirhyggja samskiftið og samstarvið millum arbeiðsgevarar og Almannaverkið.

## Sjónligari í samfelagskjakinum

Føroya Arbeiðsgevarafelag vil, at Vinnuhúsið skal verða eitt sterkt málgagn fyri alla vinnu í Føroyum. Fyri at røkka hesum máli, er neyðugt, at Vinnuhúsið er sjónligt og myndar samfelagskjakið. Av somu orsøk er Vinnuhúsið at síggja og hoyra á fleiri miðlapallum. Umframt heimasíðuna, er Vinnuhúsið eisini at finna á sosialu miðlunum Facebook, Instagram og Linkedin. Síðani við ársbyrjan í 2024 hevur Vinnukikarin, ið er poddvarpið hjá Vinnuhúsinum, eisini verið í luftini.

## Kunningartilfar til útlendingar

Vinnuhúsið og Útlendingastovan hava í felag framleitt dygdargóða kunning til tey útlendsku starvsfólkini, ið koma til Føroya at arbeiða.

Endamálið við tilfarinum er at tryggja, at útlendska starvsfólkið fær góða kunning um síni rættindi og skyldur, áðrenn tey koma til Føroya at arbeiða.





# Nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag

# Nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag

**Nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag verður vald á árliga aðalfundinum í Føroya Arbeiðsgevarafelag. Í lóggávu felagsins er ásett, at nevndin skal veljast soleiðis, at hon umboðar tær ymisku vinnugreinarnar og landið, so væl sum til ber.**

Nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag er mannað soleiðis:



## Jón Sigurdsson

*Nevndarformaður*

Jón Sigurdsson er stjóri og stovnari av byggifyritøkuni Articon. Umframt at hava verið nevndarlimur í Føroya Handverksmeistarafelag og Havnar Handverksmeistarafelag í mong ár, er hann eisini nevndarlimur í øðrum føroyskum fyritøkum. Jón Sigurdsson hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2004, og verið nevndarformaður síðan 2022.



## Høgni Hansen

*Næstformaður*

Høgni Hansen er stjóri í heilsøluni Poul Hansen, og nevndarlimur í fleiri øðrum fyritøkum. Høgni Hansen var nevndarlimur í Havnar Arbeiðsgevarafelag, áðrenn felagið varð avtikið. Í 2011 varð Høgni Hansen valdur í nevndina í Føroya Arbeiðsgevarafelag, og hevur verið næstformaður felagsins síðan tá.



## Kristoffur Laksá

*Nevndarlimur*

Kristoffur Laksá er samráðingarleiðari Føroya Arbeiðsgevarafelags. Kristoffur Laksá er eisini nevndarlimur í øðrum føroyskum fyritøkum og sat í nógv ár í nevndini í Føroya Prentsmiðjufelag. Kristoffur Laksá hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 1993.



## Jóhanna á Bergi

*Nevndarlimur*

Jóhanna á Bergi er stjóri í Atlantic Airways. Áðrenn tað, var hon stjóri í flutningsfyritøkuni Faroe Ship. Jóhanna á Bergi varð vald í nevndina í Føroya Arbeiðsgevarafelag í 2019, men hon sat eisini í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag, árini frá 2008 til 2014.



## Jens Meinhard Rasmussen

*Nevndarlimur*

Jens Meinhard Rasmussen er stjóri í Skansi Offshore og Smyril Line. Jens Meinhard Rasmussen er formaður í Reiðarafelagnum fyri Handilsskip og nevndarlimur í International Chamber of Shipping. Jens Meinhard Rasmussen hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2017.



## Fróði Magnussen

*Nevndarlimur*

Fróði Magnussen er stjóri á KT-fyritøkuni Formula. Fróði Magnussen hevur verið formaður í KT-felagnum og er framvegis nevndarlimur har, umframt at vera nevndarlimur í øðrum fyritøkum. Fróði Magnussen hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2014.



## Odd Eliasen

*Nevndarlimur*

Odd Eliasen er stjóri í Havsbrún og partur av samtaksleiðsluni í Bakkafrost. Odd Eliasen hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2017.



## Árni Ellefsen

*Nevndarlimur*

Árni Ellefsen virkar sum sjálvstøðugur ráðgevi. Hann er nevndarformaður og nevndarlimur í fleiri fyritøkum. Árni Ellefsen hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðs-gevarafelag síðan 2017.



## Ólavur Bjarkhamar

*Nevndarlimur*

Nevndarlimur Ólavur Bjarkhamar er rakstrarleiðari hjá Varðanum Pelagic á Tvøroyri. Harumframt er Ólavur ein av eigarunum av Delta Seafood á Tvøroyri. Ólavur varð valdur í nevndina í Føroya Arbeiðsgevarafelag í 2022.



MEITILBERG.COM